Búskapur og vinna:
Størri norsk nýtsla

Norska hagtalsstovan væntar, rentan fer at lækka 0,5 prosentstig í næstum, og at norðmenn fara at nýta meiri pengar til privata nýtslu í ár enn í fjør, og at gongdin verður tann sama næsta ár.

Orsøkin er til vekstandi nýtsluna er, at tann lítli prísvøksturin fer at geva stóran vøkstur í rentuinntøkuni, sama um lønarsamráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum skuldu givið minni lønarhækking enn í fjør.

Afturat hesum kemur, at veksandi íløgur í oljuvinnuni væntandi fara at hava við sær veksandi íløgur á landi. Higartil hevur hagtalsstovan væntað størri arbeiðsloysi í komandi tíð, men nú verður sagt, at tær veksandi íløgurnar væntandi fara at forða hesum.

Volvo hall

Leiðslan í svensku bilfyritøkuni Volvo hevur kunngjørt roknskapin fyri árið í fjør, og har sæst, at felagið hevði 1,9 mia. svenskar krónur í halli í 2001.

Hetta er eitt sera vánaligt úrslit samanborið við úrslitið í fyrraárið, tá Volvo hevði um fimm mia. krónur í avlopi, men leiðslan sigur, at tann búskaparliga afturgongdin í heiminum hevur eisini ávirkað virksemið hjá felagnum.

Kortini kundi leiðslan fegnast um, at umsetningurin vaks heili 50 prosent í fjør og var meiri enn 180 mia. svenskar krónur.

Volvo ger lastbilar, bussar, gravimaskinur av ymsum slagi og motorar til flogfør og skip. Ford yvirtók persónbilaframleiðsluna í 1999, men bilarnir verða kortini framvegis gjørdir í Svøríki.

UTTAN ÚR HEIMI

Al-Qaeda á veg til Vesturevropa

Tað er ikki so løgið, at fólk rýma úr Afghanistan. Her eru kvinnur í býnum Mazar-i-Sharif komnar at biðja sær kol, nú vetrarkuldin ger um seg har á leiðini

Mynd: Reuters

Millum 150 og 200 limir í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda eru eftir øllum at døma flýddir úr Afghanistan, haðani teir eru á veg til Vesturevropa, Miðasia og Ukraina

YVIRGANGSVIRKSEMI
Árni Joensen

Upplýsingarnar um teir flýddu stuðlarnar hjá Osama bin Laden stava frá keldum í til vesturevropeiska fregnartænastusamstarvinum, sum varð skipað eftir atsóknirnar í USA í fjør. Keldurnar hava tó ikki upplýst, um yvirgangsmenninir ætla at sleppa inn í tey vesturevropeisku londini sum flóttamenn ella sum vanligir ferðamenn.

Eftir upplýsingunum hava allir al-Qaeda-menninir fingið nýggj klæði, eftir at teir flýddu úr Afghanistan. Samstundis hava teir klipt og rakað sær og eru tískil ikki lættir at kenna aftur. Eisini verður sagt, at menninir hava fingið nýggjar pengaseðlar og følsk samleikaprógv.

Vesturlensdsku fregnartænastukeldurnar siga, at umleið 500 afghanar, sum eru komnir til Hollands, eru í ferð við at rýma haðani, tí hollendsku myndugleikarnir hava treytirnar fyri at geva fólki uppihaldsloyvi. Hildið verður, at fleiri av teimum 500 fara at royna at sleppa til okkurt av Norðurlondunum, og ein arabari, sum býr í Hollandi, skal hava játtað at smugla fleiri teirra til eitt av Norðurlondunum. Tað er tó ikki vist, at hesi eisini eru stuðlar hjá Osama bin Laden.

Norsku myndugleikarnir kunngjørdu í vikuni, at teir hava lagt til merkis, at talið á flóttafólki úr Afghanistan er vaksið í seinastuni.

Manningin á "Kursk" forðaði geiðslavirknum leka

Russiskir serfrøðingar, sum hava kannað vrakið av kjarnorkukavbátinum, siga, at Rashit Arjapov, skipari og manning hansara forðaðu fyri geiðslavirknum leka úr kavbátinum

KJARNORKA
Árni Joensen

Líka síðani "Kursk" sakk í Barentshavinum fyri hálvum øðrum ári síðani, og til vrakið varð tikið uppaftur í heyst, hevur verið tosað um vandan fyri geiðslavirknum leka úr kavbátinum. Serliga norðmenn og russar hava verið óttafullir, til dálking av hesum slagnum kundi fingið sera álvarssamar avleiðingar fyri umhvørvið í og við Barentshavið.

Men sambært teimum russisku serfrøðingunum, sum hava kannað vrakið, nýtist ongum at stúra. Í frágreiðingini skriva teir, at hitin í kavbátinum vaks sera nógv eftir ta hørðu spreingingina har frammi í bátinum. Hetta kundi havt við sær, at rivur kundu komið í bjálvingina , sum var uttan um kjarnorkureaktorin, men at tað eydnaðist manningini at forða hesum við at sleppa hátrýstgassi út í rúmið kring reaktorin.

Russisku bjargingarliðini hava higartil funnið líkini av 94 av teimum 118 monnunum, sum vóru við "Kursk".

Úr Norðurlondum:
Longri opið

Norska stjórnin fer at leggja fram eitt uppskot, sum skal gera tað møguligt hjá handlum at hava opið alt samdøgrið.

Laila Dåvøy, ráðharri sigur, at ætlanin er at strika reglurnar, sum áseta, nær ein handil kann vera opin gerandisdagar. Broytingin fer at bera í sær, at kunnu handilsmaðurin og starvsfólk hansara einast um tað, kann handilin vera opin alt samdøgrið. Tey, sum eiga handlar, fegnast um uppskotið, men tey, sum arbeiða í handlunum, eru alt annað enn fegin.

Stjórnin hevur boðað frá, at hon ætlar sær ikki at strika reglurna um, nær handlar kunnu vera opnir sunnu- og halgidagar.

Veljarar flyta

Borgarliga stjórnin í Danmark hevur júst somu undirtøku í dag, sum hon fekk á valinum í november. Sambært einari nýggjari kanning høvdu Vinstri, Teir Konservativu, Danski Fólkaflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin fingið 98 tinglimir, var val nú. Tað er tað sama, sum teir fingu valdagin.

Samstundis vísir kanningin, at Teir Konservativu høvdu mist tveir tinglimir, og at Vinstri hevði fingið teir.

Ja til evruna

Í Svøríki vísir ein meiningakanning, at altsamt fleiri sviar taka undir við, at evran verður svenskt gjaldoyra ístaðin fyri krónuna. Kanningin sigur, at 53 prosent taka undir við felags evropeiska gjaldoyranum, meðan 34 prosent vilja varðveita krónuna. Stjórnin hevur sagt, at spurningurin um at seta evruna í gildi helst verður næsta ár.

Trupulleikar á West Navion

-seinka tó neyvan boring hjá Hess á Atlantsmóti

OLJULEITING
Jan Müller

Hóast effektivt og skjóttvirkandi hevur norska boriskipið West Navion eisini havt trupulleikar at dragast við. Vit sóu hetta, tá skipið boraði á føroyska landgrunninum og aftur, tá tað boraði á bretskum øki. Nú er skipið stætt í Kanda, har tað borar fyri Marathon og hevur aftur fingið trupulleikar at dragast við. Uppstream skrivar, at onkrir tekniskir trupulleikar í boripartinum koma at seinka boring í einar tvær vikur. Ætlanin er at West Navion skal bora fyri Enterprise í írskum sjógvi eftir boring í Kanada og eftir tað skal skipið bora fyri The Faroes Partnersamtakið við Amerada Hess á odda. Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess sigur, at teirra ætlan heldur framvegis, og hon er at bora ein brunn í bretskum øki skamt frá føroyska markinum í øðrum ársfjórðingi. Um hetta verður í aprí, mei ella juni veit hann ikki at siga við vissu. Hann roknar ikki við, at trupulleikarnir í Kanada fara at seinka teirra boring.

– Trupulleikar á West Navion fara neyvan at seinka okkum. Hess borar í bretskum øki við markið í apríl, mei ella juni.

Gitt verður annars nógv um, hvussu gongst við evalueringini av Amerada Hess fundinum. Onkur kelda vil vera við, at talan er um eitt stórt fund, har tað bæði eru olja og gass í undirgrundini, men at tað eisini eru minus við fundinum t.d. at porøsiteturin í steininum skal vera lágur. Um onnur viðurskifti eru góð, so nýtist hetta ikki at verða so stórur vansi. Eftir tí blaðið veit, so er ætlanin við brunninum, sum West Navion skal bora hinumegin markið at brúka hann sum eitt slag av metingarbrunni fyri fundið, sum er gjørt á føroyskum øki. Hildið verður fyri vist, at eitt oljufelt liggur báðumegin markið. Sum skilst kann møguliga okkurt meira ítøkiligt sigast um fundið einaferð í summar.

Agip fyrireikar seg til boring

OLJULEITING
Jan Müller

- Vit bora besta brunnin, á tí besta staðnum til bestu tíðina. Hetta sigur Ron Lansdell, leitistjóri fyri Føroyaøkið hjá italska oljufelagnum Agip , nú tað bert er umleið eitt hálvt ár eftir, til felagið ætlandi setir borin í føroysku undirgrundina. Agip og Føroya Kolvetni eru fjórða samtakið, sum bora á landgrunninum. Í fjør boraðu trý samtøk á landgrunninum, BP, Statoil og Amerada Hess. Nú kemur so túrurin til Agip, sum hevur bundið seg at bora ein brunn í seinasta lagi í august í ár. Sambart loyvinum skulu ikki ganga meira enn tvey ár til borað verður.

Ron Lansdell váttar, at Agip í farnu viku var á fundi við Oljumálastýrið. Hann sigur, at hetta var ein rutinufundur, har greitt varð frá gongdini og støðuni. – Vit eru á rætta sporinum til røttu tíðina sigur hann men vísir á, at enn er nakað av arbeiði eftir at gera, áðrenn teir kunnu seta borin í. Teir hava fingið til vega nógvan 3D seismikk, sum skal beina teir á rætta staðið, tá borurin skal setast í. Ron Lansdell vil ikki siga nakað um, júst hvar í økinum teir fara at bora ella nær. Teir hava leitað eftir einum hóskandi boripalli men vil hann ikki upplýsa, um teir hava funnið ein pall til boringina á Føroyaøkinum.

Tað hevur ljóðað, at Agip hevur samráðingar við onnur oljufeløg um at koma uppí loyvið hjá felagnum, men heldur ikki tað hevur leiðarin av føroyska bólkinum hjá Agip nakra viðmerking til. Hann vísir á, at Agip fer at halda seg ásetingarnar í loyvinum teir hava fingið. Vanliga er stórur gravgangur eftir teimum boripallum, sum kunnu nýtast til djúpt vatn. Sovereign Explorer, sum boraði tveir brunnar á landgrunninum í fjør, skal bora hinumegin markið fyri Texaco í ár. West Navion, sum boraði ein brunn á føroyskum øki í fjør, skal bora brunnar vestan fyri Írland og vestan fyri Hetland í ár.

British Gas framvegis í Føroyum

OLJULEITING
Jan Müller

Bretska oljufelagið BG hevur ikki tikið seg úr Føroyaøkinum. Hetta fáa vit upplýst frá Oljumálastýrinum, eftir at skotska blaðið Press and Journal í farnu viku skrivaði, at felagið skal hava tikið seg heilt burtur úr Føroyaøkinum.

British Gas er framvegis partur av The Faroes Partnership samtakinum, sum hevur leitiloyvi á landgrunninum. Felagið er tó ikki við í tí seinasta partinum av boringini í fjør, har Amerada Hess fann olju og gass. Tá varð upplýst frá felagnum, at tað hevði avgjørt ikki at vera við til at fíggja eina víðkaða boring. Eftir at olja var funnin har úttalaði umboð fyri BG seg til Sosialin og segði, at teir umhugsaðu at keypa seg innaftur í tann partin av boringini.

Ben Arabo, stjóri hjá Amerada Hess sigur, at BG framvegis er í bólkinum og hevur bundið seg til at vera við í enn eini boring. Tað stendur so felagnum frítt í at koma uppí fundið, sum varð gjørt, men felagið hevur eftir øllum at døma ikki tikið støðu til hetta. Tað fer at kosta BG stórar upphæddir at koma uppí aftur tann partin av boringini, sum nú verður hildin at goyma størar nøgdir av olju og gassi.

Í greinini í Press and Journal 30. januar stendur, at BG í fjør tók seg úr Føroyaøkinum og samtakinum, sum Amerada Hess stendur á odda fyri. Blaðið skrivar eisini, at BG er farið at vísa Grønlandi størri ans. Eftir at Phillips og Statoil hava tikið seg úr leitingini í Grønlandi umhugsar BG at vera við í eini komandi loyvisumfari.

Grønland fer at lata upp fyri leiting í apríl, 10 ár eftir at ein loyvisrunda miseydnaðist, tí eingi feløg vístu áhuga. Seinni fingu Statoil og Phillips tvey loyvi men hava so latið tey aftur eftir vánalig leitingarúrslit. Grønlendskir oljumyndugleikar gera eitt stórt arbeiði fyri at marknaðarføra komandi útbjóðing og verður serstakliga satsað uppá at fáa stór og peningasterk oljufeløg ella samtøk at seta seg niður í Grønlandi og harvið verða við til at menna eina oljuvinnu uppá longri sikt.

Stórur brúktbilamarknaður

Mazda 323 S 1,5i LX
Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km.68.000, árg. 05/97
Sleipikrók 90.000,-

Mazda 323 S 2,0 Diesel LX
Grønur, 4 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 06/98
90.000,-

Mazda 323 S 2,0 Diesel LX
Gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 01/98
105.000,-

Mazda 929 S 2,2i GLX
Sýnaður 05/01 Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km.145.000, árg. 03/89
Sóltak 28.000,-

Fiat Multipla 1,6
Gráur, 5 hurðar, 5 gear, árg. 01/00
138.000,-

Ford Escort 1,8 Diesel Sedan
Sýnaður 02/00 Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km.126.000, árg. 09/95
66.000,-

Ford Escort 1,8TD St.Car
Sýnaður 02/00 reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.44.000, árg. 08/97
110.000,-

Volvo 440 GLT
Sýnaður 12/00 Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 06/00
48.000,-

Renault Megane
Beige, 4 hurðar, 5 gear
Km. 38.000, árg 06/98

105.000,-

Ford Mondeo
Sýnaður 01/00 Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km.80.000, árg. 01/95
Sóltak 60.000,-

Honda Civic S 1,4 IS
Sýnaður 04/02 Hvítur, 4 hurðar, 5 gear, Km.76.000, árg. 12/98
98.000,-

SAAB 900
Sýnaður 04/01 Hvítur, 4 hurðar, 5 gear, Km.171.000, árg. 10/88
5.000,-

Renault Megane 1,4e
Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.34.000, árg. 08/98
110.000,-

Renault Megane 1,4e
Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.58.000, árg. 04/97
120.000,-

Renault Megane 1,6e
Sýnaður 09/00 Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.60.000, árg. 12/96
100.000,-

VW Golf Turbo Diesel
Reyður, 3 hurðar, 5 gear, árg. 1992
Sóltak 70.000,-

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35